Javnstøða • Rigmor Dam • rigmor@sosilurin.fo

# Kvinnusøga

**Ikki minni enn 650 fólk vóru til rimmarstóra javnstøðutiltakið hjá blaðnum Kvinnu á Hotel Føroyum í morgun.**
**Fólk úr øllum landinum høvdu leitað sær niðan á Hotel Føroyar í morgun, har blaðið Kvinna skipaði fyri stórum javnastøðutiltaki, við fjølbroyttum fyrilestrum, tónleiki, mati og drekka.**

**Hýrurin var sera góður og í steðginum vóru orð at hoyra sum føroysk feminisma, katratiónsangist, pápabarsil, primitivar urkreftir og vitan er vald.**
**Í blaðnum í morgin hava vit stóra frágreiðing frá tiltakinum, prát við luttakarar og fyriskiparar.**


*Landsstýrismaður í Javnstøðumálum, Bjarni Djurholm í fremstu røð*


*Blaðstjórin á Kvinnu, Lena L. Mohr, bjóðar vælkomin*


*Jóannes Eidesgaard, løgmaður, setir ráðstevnuna*



*Elisabeth Møller Jensen frá Kvinneligt Samfund og Kvinfo talaði um royndir sínar í kvinnustríðnum*


*Brynhild Thomsen, journalistur, var orðstýrari og helt ein áhugaverdan og stuttligan fyrilestur um kvinnukor og fjølmiðlar.*